# Aria og Flux af

*Leygarkvøldið 15. Apríl verður skipað fyri stórum konsert og dansitiltaki í høllini á Kambsdali, har Aria, Flux og Arnfríð Lützen vera at hoyra*

Fluks



FRÓÐI LØKSÁGARÐ

Leygardagin 15 Apríl hendir eitt og annað spennandi á Kambsdali. Eftir stóra barnatiltakið við Kulum Rótum, búktalara, dukkum, og leikandi og syngjandi børnum, verður skipað fyri minst líka forvitnisligari konsert og dansitilaki um kvøldið, har bólkarnir Aria, Flux og unga sangkvinannan Arnfríð Lützen luttaka. Lítið hevur verið at hoyrt til bæði Aria og Flux seianastu tíðina, so tað má sigast at hetta er ein góður møguleiki at hoyra tveir av teimum tíðandi føroysku bólkunum aftur, og hoyra hvat teir hava at bjóða uppá.

### Eitt ár síðan fløguútgávuna

Í hesum døgum er júst eitt ár ligið síðani fløgan After These Messages var send á marknaðin. After These Messages er fyrsta útgávan hjá klaksvíksbólkinum Aria. Aria gjørdu rættuliga vart við seg, tá teir luttóku í Prix Føroyar kappingini í 1997, har teir endaðu á triðja plássi. After These Messages hevur selt rættuliga væl, og okkurt lagið hevur eisini vunnið seg inn á fimtan tær bestu hjá útvarpinum.Tvey tey fyrstu upploginini eru útseld, og í løtuni verður bíðað eftir at triðja upplagið skal koma heim. Sum nakað nýtt so hevur TUTL sum stendur fyri útbreiðsluni av fløguni, gjørt royndir at marknað-arføra fløguna á allnótini eisini. Á allnótarbústaðnum www.amazon.com ber til at keypa fløgur og bøkur. Leitar tú nóg væl, so finnur tú eisini fløguna hjá Aria har, og enntá hevur onkur verið so beinasamur at skriva eitt ummæli, soleiðis at áhugaðir keyparar kunnu fáa eina ábending um hvat tað er Aria hava at bjóða uppá.

Rættuliga friðarligt hevur verið rundan um Aria higartil í ár. Hetta er fyrsta høvið hjá fólki at hoyra Aria til eitt stórt tiltak í ár. Limirnir í Aria eru spjaddir í løtuni, tveir ganga í skúla í Havn, og guitarleikarin Petur Hans Nicla-sen gongur í skúla í Danmark. Av hesum sama hevur Aria mestsum ligið stilt tað sum er farið av árinum. Leygarkvøldið verður tó spælt við fullari manning. Teir í Aria siga annars, at hetta nokk verður einasta stóra framførðslan hjá teimum líka til einaferð seint í summar, tá teir hava ætlanir um at fara at

Arnfríð

